

## VEGLEIÐING TIL

# STEYRAR

**Soleiðis merkir tú upp bygdagøtur, gongutúrar og leiðir út á eitt nú útsýnisstøð.**

## » BÍLEGGING

Steyrar kunnu fáast við at venda sær til avvarðandi kommunu ella kunningarstovu, ið kann fáa steyrar útvegaðar frá Visit Faroe Islands.

## » FÝRA LITIR

Steyrarnir eru í fýra ymiskum litum. Vit mæla til, at liturin á steyranum samsvarar við torleikastigið á túrinum. Torleikastigið verður mett út frá ásettum forskriftum.



| 1.0 | 2.0 | 3.0 | 4.0 |
|---|---|---|---|
| Easy | Medium | Challenging | Expert |



## » TVÆR STØDDIR

Steyrarnir eru í tveimum hæddum. Støddirnar eru 50 og 60 cm.

Val av stødd er treytað av, um tað er innangarðs ella uttangarðs. Innangarðs er grasið ofta sítt og tætt, so tá skal størri steyrin veljast.




## » NIÐURSETING

Uttangarðs skal steyrin stinga umleið 20 cm upp úr bønum, og innangarðs skal steyrin stinga umleið 30 cm upp úr bønum. Við hesi hædd er steyrin týðiligur í lendinum, samstundis sum steyrin er ov lágur, til at seyður fær brúkt hann at skriða sær við.

Gloppið millum steyrarnar broytist alt eftir lendinum. Sæst gøtan væl, er longri millum steyrarnar, og er gøtan minni sjónlig, er tættari millum steyrarnar. Steyrarnir skulu verða lættari at síggja.

Brúka eina lítla sleggju at sláa steyran niður í bøin. Hav eitthvørt ímillum sleggju og steyra, tá tú slært, soleiðis at steyrin ikki verður skammfílaður, og haldførið harvið minkar.

